# Føroysk heiti á fuglakroppi og fjaðurbúna

## *Faroese bird topography names*

***Leivur Janus Hansen[1] og Bergur Olsen[2]***

1 Føroya Náttúrugripasavn
V.U. Hammershaimbsgøta 13
FO-100 Tórshavn
E-mail: janush@savn.fo

2 Havstovan
Nóatún 1
P.O. Box 3051
FO-110 Tórshavn
E-mail: berguro@hav.fo

## Úrtak

Tá ið ein skal greiða frá fuglakroppinum, tróta ofta heiti, sum beinleiðis kunnu samanberast við útlendsk heiti. Hetta er mest galdandi í samband við fjaðurbúnan, veingir, høvd og bein. Í hesi grein verða nøvn sett á teir partar, ið frammanundan ikki hava nøvn, og skotið verður upp, hvat navn skal nýtast, tá ein partur hevur fleiri nøvn.

## Summary

Many parts of the bird topography do not have any Faroese names. On the other hand a single part may have several names. In this paper names are given to parts missing them, and a single name is suggested for parts where several names exist.

## Inngangur

Tá ið ein skal greiða nærri frá fuglakroppinum og fjaðurbúnanum, tá tróta ofta heiti, sum beinleiðis kunnu samanberast við útlendsk heiti, ella tey eru so sjáldan brúkt, at tey eru lítið kend. Hetta sæst best, tá ið útlendskur tekstur verður týddur til føroyskt. Eingin trupulleiki er av teimum stóru vælkendu pørtunum á kroppinum; t.d. høvd, nev, hálsur, búkur, ryggur, vongur, vel og bein. Verri er, tá ið ein skal greiða nærri frá fjaðurbúnanum, veingjunum, høvdinum og beinunum.

Tey flestu føroysku heitini, á fuglakroppinum, finna vit í bókini Dýralæra 3 eftir

Theodor Hansen (1972), sum er skrivað á einum skeiði á Fróðskaparsetrinum í 1969. Theodor Hansen fekk innihaldsligar leiðbeiningar frá J. Rasmussen, J. S. Joensen og A. Reinert, og málsligar leiðbeiningar frá J. H. W. Poulsen; eisini B. Holm og S. Tausen vóru góðir stuðlar. Hesi heitini hava sostatt fingið sera góða viðgerð, og har er m.a. ein tekning av eini fjøður og einum vongi við heitum á. Í bókini Fuglar í Norðurhøvum (Sørensen og Bloch, 1990a), sum Theodor Hansen og Svenning Tausen týddu úr donskum, er eisini greitt frá nógvum heitum á fuglakroppinum saman við tekningum. Summi heiti í Fuglar í Norðurhøvum eru nýggj, og onkur eru broytingar av teimum gomlu hjá Hansen (1972).

Umframt í áðurnevndu keldum eru heiti funnin í bókunum Dýralæra (Hansen, 1964), Fuglabókin, Dýralæra 2 (Ryggi, 1978), Dagbók skrivað á eini ferð til Føroya í árinum 1828, sum Eyðun Winther týddi úr týskum (Graba, 1987), Føroysk-føroysk orðabók (Poulsen *et al.*, 1998), Ensk-føroysk orðabók (Skála og Mikkelsen, 2013) og Náttúrusøga, Dýr og plantur (Hansen, 2005).

## Framferð

Arbeitt hevur verið við at endurskoða og áseta heiti til partar av fuglakroppinum og týdningarmestu partarnar av fjaðurbúnanum. Í hesum arbeiði hava Leivur Janus Hansen, Jens-Kjeld Jensen og Bergur Olsen luttikið, og Marjun Arge Simonsen hevur verið málsligur ráðgevi til ein part av arbeiðinum.

Í hesi greinini savna vit føroysk heiti á fjaðurbúnanum og fuglakroppinum. Har vit í áðurnevndu keldum finna ymisk heiti fyri sama „lut", vísa vit á, hvat vit meta hóskar best. Harafturat koma vit við uppskotum til nýggj heiti, har vit meta, at tørvur er á tí. Fyri øll føroysk heiti verður víst til eitt samsvarandi enskt heiti, ið stavar frá Handbook of the Birds of Europe, the Middle East, and North Africa: The Birds of the Western Palearctic (Cramp, 1977) (Talva 1) ella Fundamentals of Ornithology (van Tyne og Berger, 1976) (Talva 2).

Heitini verða viðgjørd í fleiri pørtum. Hesir partar eru: kroppur, høvd, bein, veingjafjaðrar, velfjaðrar og fjaðurbúnin. Har myndir eru mettar hóskandi – og tøkar – eru heiti sett á. Harumframt eru tvær talvur, har øll heiti eru savnað á enskum og føroyskum. Fjaðurbúnin broytist alla tíðina, t.d. frá unga til vaksnan fugl og frá summarbúna til vetrarbúna. Serstøk heiti í tílíkum sambandi verða ikki viðgjørd her.

## Kroppur

Tað eru nógv heiti fyri ymsar partar á kroppinum (Mynd 1), og tí er væntandi, at fleiri orð eru fyri sama kropspart. Hóast vit hava sett føroysk heiti fyri tey ensku, so taka vit ikki dagar ímillum hvørji av fleiri væl kendum orðum er rættast. Sum

dømi um orð, ið vit meta eru eins røtt, kunnu nevnast bak og ryggur, síða og lið, enni og panna.

Vit hava ikki megnað at funnið tvey heiti fyri ensku „chest“ og „breast“. Vit nevna bæði bringa.

## Høvd

Høvd og nev á fugli hava sera ymiska útsjónd alt eftir, hvat fyri fuglaslag talan er um (Mynd 3). Tí er brúk fyri heitum, sum passa til tey ymsu fuglasløgini. Á mynd 3 eru nøkur av vanligastu heitunum víst. Á myndini verður víst til negl, snið, saðil og so framvegis, men einki er forgjørt í at nevna hesi nevnegl, nevsnið, nevsaðil og so framvegis.

Av heimafuglunum, so hava høsn ein eyðkendan reyðan húðarlepa á høvdinum, sum nevnist reykur („comb“ á enskum) og ein undir kvørkrunum, sum nevnist silpa („wattle“ á enskum) (Hansen, 1964; Poulsen *et al.*, 1998; Ryggi, 1978).

Vit hava ikki sett serstøk føroysk heiti á ensku „ruff“, „nuchal collar“ og „gorget“. Kápurgrælingur (*Philomachus pugnax*) eitur Ruff á enskum, tó „mantle“ er eisini umsett til kápa, og so framvegis. Heldur ikki økini við eyga og nev, ið á enskum verða nevnd „lore“ og „malar region“ hava fingið føroysk heiti.

Mynd 1. Gráspurvur (endurgivið við loyvi frá Oxford University Press).



Mynd 2. Høvd á ymsum fuglum (endurgivið við loyvi frá Oxford University Press).




## Bein

Beinini á fugli eru eitt sindur ymisk frá tí, vit kenna frá súgdjórum (Mynd 3). Hóast somu heiti verða nýtt til bein á fugli og á súgdýrum, so er tað ikki altíð, at hesi vísa til neyvt sama lut. Á mynd 3 sæst lærið koma undan. Á fugli nýta vit heitið lær um tað, ið samsvarar við tjógv á seyði, t.v.s. bæði langlegg og tjólegg. Sjálvi beinini minna um tey hjá súgdjórum, men fóturin brýtur nógv frá. Har súgdýr hava fleiri bein í ristini eru hesi, hjá fuglum, vorðin til eitt langt bein, fótleggin. Tærnar hjá fuglum eru sera langar, og uttast á hvørjari tá er ein klógv.

Fuglar, sum liva í vátlendi, hava ofta long bein. Tærnar eru eisini ymiskar eftir um fuglar t.d. liva í trøum ella á sjónum. Teir, sum sita í trøum ella ganga á turrum, hava langar tær, meðan teir, sum ganga í vátlendi, hava partvís fit ímillum tærnar, og teir sum svimja hava stórar fitjur. Rovfuglar hava sterkar tær og stórar kløur at halda veiðini við.

Á mynd 3 sæst ein fuglur, ið hevur eina baktá og tríggjar tær, ið venda frameftir. Soleiðis er ikki hjá øllum fuglum. Summir hava t.d. tvær tær aftureftir og tvær frameftir. Tískil er neyðugt at nevna tærnar á teimum fuglunum hareftir, eitt nú, innara baktá og ytra baktá, ella innara, næsta, triðja, og uttasta tá, har allar fýra venda frameftir.

Mynd 3. Hegri (endurgivið við loyvi frá Oxford University Press).




## Veingjafjaðrar

Fjaðrarnar, sum sita á handabeininum, verða nevndar handflogfjaðrar (Mynd 4). Fuglar, sum flúgva, hava frá 9 til 12 handflogfjaðrar, tó eru tær uttastu ofta smáar ella horvnar. Flogfjaðrarnar, sum sita á albogalegginum, verða nevndar armflogfjaðrar. Talið á armflogfjaðrunum er meira ymiskt; úr 6 á kolibri heilt upp til 32 á súlukongi. Tær einstøku hand- og armflogfjaðrarnar verða nevndar við nummari eftir hvar, tær sita í raðnum. Handflogfjaðrarnar verða taldar frá tí innastu til ta uttastu, meðan armflogfjaðrarnar verða taldar frá tí uttastu til ta innastu. Fremst á veinginum er ein sonevnur tumlavongur, og á honum sita tumlaveingjafjaðrar (Hansen, 1972).

Mynd 4. Høgri vongur (endurgivið við loyvi frá Oxford University Press).




Oman á flogfjaðrunum eru nøkur røð av styttri fjaðrum, ið verða nevndar lokafjaðrar. Raðið beint omanfyri flogfjaðrarnar verður nevnt stóru arm- og handlokafjaðrar. Oman fyri hesar sita miðal armlokafjaðrar og smáar armlokafjaðrar. Lokafjaðrarnar fremst á veinginum nevna vit randlokafjaðrar.

Lokafjaðrar sita bæði á yvirsíðuni og undirsíðuni á veinginum. Tí er neyðugt at kunna gera greitt, hvørt talan er um eina lokafjøður, ið situr oman á ella undir veinginum. Av tí, at tað oftast verður víst til fjaðrar, ið sita á yvirsíðuni, verður tað tikið fyri givið, at, eitt nú, miðal armlokafjaðrarnar sita á yvirsíðuni. Er ivamál, er neyðugt at vísa til miðal yvirarmlokafjaðrarnar. Er talan um fjaðrar á undirsíðuni, er neyðugt at gera hetta greitt, við at nevna tær undirarm- og undirhandlokafjaðrar.

Lokafjaðrarnar á undirsíðuni á veinginum eru skipaðar á sama hátt sum omaná, men fjaðrarnar og røðini eru ikki eins fullfíggjað.

## Velfjaðrar

Flogfjaðrarnar í velinum verða nevndar velflogfjaðrar, og tær eru vanliga 12 í tali (6 pør) (Mynd 1). Uppi yvir teimum eru týðiligar yvirvelfjaðrar í nøkunlunda sama tali, og undir velflogfjaðrunum eru undirvelfjaðrar, men tær eru ikki so týðiligar (Mynd 3).

Minturin er aftast á fuglinum, ið á fakmáli verður nevnt „uropygium“. Umframt

aðrar fjaðrar, so sita allar velfjaðrarnar í mintinum (Poulsen *et al.*, 1998). Eyðun Winther nýtir orðið mintfjøður og yvirmintfjøður í týðing sínari (Graba, 1987) og Sørensen og Bloch (1990a) kalla fjaðrar undir velinum fyri mintfjaðrar. Av tí at minturin er meira umfatandi og m.a. drunnurin eisini er partur av honum, hava vit valt ikki at nevna ávísar fjaðrar eftir honum.

Tað kemur fyri, at sama heiti ikki er á eini mynd og í talvu 1 ella talvu 2. Hetta er fyri at vísa, at tað er einki galið í at nýta eina einfaldari útgávu av einum heiti. Sum dømi kann nevnast, at á mynd 4 stendur randlokafjaðrar, meðan tað í talvu 1 stendur m.a. rand undirarmlokafjaðrar.

Heitini her bróta nakað frá heitunum í Fuglar í Norðurhøvum (Sørensen og Bloch, 1990a). Vit meta, at heitini fyri lokafjaðrarnar á myndini á síðu 47 í Fuglar í Norðurhøvum ikki eru eftirfarandi, tí her verður eftir øllum at døma ikki gjørt munur á hand- og armlokafjaðrum, hetta er eisini frávik frá donsku útgávuni av somu bók (Sørensen og Bloch, 1990b). Sum dømi kann nevnast „miðveingjarfjaðrar". Navnið vísir ikki heilt greitt, hvar í veinginum fjaðrarnar eru ella um tær eru á yvir- ella undirveingi. Bera vit saman við uppskotið í hesi grein, hava vit ásett navnið miðal yvirhandlokafjaðrar; her skilst, at hetta eru lokafjaðrar, ið liggja oman á stóru handlokafjaðrunum. Sostatt er navngávan skilvísari og gjøgnumskygdari.

## Fjaðurbúnin

Eyðkennið fyri fuglar er, at teir hava fjaðrar (Mynd 5), og tað eru fjaðrarnar, sum gera fuglarnar førar fyri at flúgva. Men fjaðrarnar hava eisini nógvar aðrar eginleikar, t.d. bjálva tær kroppin ímóti bæði kulda og hita, og í nógvum førum rínur vatn ikki við fjaðrarnar.

Talið á fjaðrum er sera ymist alt eftir støddini á fuglinum; kolibriir hava knapt




Mynd 5. Fjøður og dún.
p = posi, b = blað, l = leggur, D = dún, kr = krókur, ht = hjáteinar, t = teinar (endurgivið við loyvi frá Føroya Náttúra – Føroya Skúli).

1000 fjaðrar og svanir fleiri enn 25.000. Fjaðrarnar sita ikki javnt um kroppin, men vaksa í fjaðurteigum, og har ímillum er holdið nakið ella dúnvaksið.

Fjaðrar eru útvøkstir úr hornevni (keratin), sum vaksa úr poknum í skinninum á fugli. Niðast á eini fjøður er posin (Mynd 5). Út frá hesum posa gongur leggurin við einum blaði á hvørjari síðu. Blaðið er sett saman av klønum teinum, sum standa út frá báðum síðunum á legginum og peika frameftir. Út frá hesum teinum stendur eitt ótal av sera klønum hjáteinum, sum peika frameftir og aftureftir. Hjáteinarnir, ið venda aftureftir, hava ryggir og foyrur, meðan teir, ið venda frameftir hava krókar. Hesir krókar krøkja í hjáteinarnar á teinunum beint frammanfyri. Á henda hátt verður øll fjøðurin sum eitt sera lætt og sterkt blað. Á teimum flestu fjaðrunum eru bæði bløðini líka stór, men á t.d. handflogfjaðrunum er tað uttara blaðið oftast nógv smalri enn tað innara. Á teimum uttastu handflogfjaðrunum kann tað vera eitt innvik í fjøðurblaðnum øðrumegin ella báðumegin við og verða hesar fjaðrar sagdar at vera sneiddar.

Oddurin á fjaðrunum peikar aftur eftir, og tær liggja oman á hvørjari aðrari; tann fremsta ovast, so kroppurin gerst smidligur og vatn rennur ikki inn í dúnið. Fuglurin hampar og reinsar fjaðrarnar við nevinum og smyr tær við feitti, sum hann fær úr mintkertlinum, og hetta ger, at vatn ikki rínir við fjaðrarnar. Í skinninum rundan um posan eru vøddar, so fjaðrarnar kunnu reisast ella leggjast tættari inn ímóti kroppinum fyri t.d. at regulera hitan.

Meginparturin á kroppinum er klæddur við fjaðrum. Fjaðrar eru ymiskar alt eftir hvar tær sita á kroppinum, og hvat endamál tær hava. Undir fjaðrunum er mjúkt dún. Hetta er eitt slag av fjøður, sum ikki hevur legg, men bara mjúkar, langar teinar, sum ongar krókar hava. Dúnið bjálvar sera væl, tí luftin verður standandi still í dúninum ímillum fjaðrarnar og kroppin. Vit hava ikki sett serstøk føroysk heiti á ymsu sløgini av dúni: „powder down", „semiplumes" og so framvegis. Vit nýta einans orðið dún.

Talva 1. Ensk heiti úr bókini Handbook of the Birds of Europe, the Middle East, and North Africa (Cramp, 1977) , føroysk heiti úr fleiri keldum: [1]Graba, 1987; [2]Hansen, 1964, [3]1972, [4]2005; [5]Poulsen *et al.*, 1998; [6]Ryggi, 1978; [7]Skála og Mikkelsen, 2013; [8]Sørensen og Bloch, 1990a og okkara uppskot um hvat er frægasta orðið at brúka á føroyskum.

| Ensk heiti | Føroyska heiti | Okkara uppskot |
|---|---|---|
| Primaries | Handveingjafjaðrar [3]<br>Handfjaðrar [1]<br>Ytru flogfjaðrar [8] | Handflogfjaðrar |
| Secondaries | Armveingjafjaðrar [3]<br>Armfjaðrar [1]<br>Innaru flogfjaðrar [8] | Armflogfjaðrar |

| Ensk heiti | Føroyska heiti | Okkara uppskot |
|---|---|---|
| Tertials | Herðafjaðrar [4] | Herðafjaðrar |
| Primary coverts | Veingjarlívdarfjaðrar [1,8] | (Yvir)handlokafjaðrar |
| Greater ~ | Stórar veingjarfjaðrar [8] | Stóru ~ |
| Median ~ | Miðveingjarfjaðrar [8] | Mið ~ |
| Upper wing-coverts | | (Yvir)armlokafjaðrar |
| Greater ~ | Veingjarfjaðrar [8] | Stóru ~ |
| Median ~ | | Mið ~ |
| Lesser ~ | Smáar veingjarfjaðrar [8] | Smáu ~ |
| Marginal ~ | | Rand ~ |
| Under primary coverts | | Undirhandlokafjaðrar |
| Greater ~ | | Stóru ~ |
| Median ~ | | Mið ~ |
| Lesser ~ | | Smáu ~ |
| Under wing-coverts | | Undirarmlokafjaðrar |
| Greater ~ | | Stóru ~ |
| Median ~ | | Mið ~ |
| Lesser ~ | | Smáu ~ |
| Marginal ~ | | Rand ~ |
| Bastard wing | | Tumlavongur |
| | Tumlaveingjafjaðrar [3] | Tumlaveingjafjaðrar |
| Axillaries | Akslafjaðrar [8] | Kílafjaðrar |
| Speculum | Spegil [3,6,8] | Spegil |
| Emargination | | Sneiðing |
| Tail feathers | Velfjaðrar [4] | Velflogfjaðrar |
| Upper tail-coverts | Yvirmintfjaðrar [1] | Yvirvelfjaðrar |
| Under tail-coverts | Undirmintfjaðrar [1]<br>Mintfjaðrar [1,8] | Undirvelfjaðrar |
| Forehead | Panna [6]<br>Enni [8] | Enni |
| Crown | Knóri [1]<br>Skalli [1,6,8] | Skalli |
| Nape | Nakki [1,6,8] | Nakki |
| Upper Mandible | Yvirnev [2,6] | Yvirnev |
| Lower Mandible | Undirnev [2,6] | Undirnev |
| Bill | Nev | Nev |
| Ear-coverts | Oyrnafjaðrar [8]<br>Vangafjaðrar [8] | Oyrnafjaðrar |
| Side of neck | | Síða á hálsinum |

| Ensk heiti | Føroyska heiti | Okkara uppskot |
|---|---|---|
| Hindneck | | Aftan á hálsinum |
| Throat | Kvørkrar [8] | Kvørkrar |
| Foreneck | | Framman á hálsinum |
| Culmen | Nevryggur [1] | Nevryggur |
| Nail | | Nevnegl |
| Gonys | | Nevsnið |
| Cutting edges | Egg [1] | Egg |
| Gape | Munnviki [1]<br>Viki [1] | Viki |
| Crest | Toppur | Toppur |
| Nostril | Nasagluggi [1,4] | Nasagluggi |
| Chin | Øsi [6] | Øs |
| Cheek | Vangi [6,8] | Vangi |
| Malar region | | |
| Malar stripe | Hálsrípa [8]<br>Barkarípa [8] | Hálsrípa |
| Moustachial stripe | Skeggrípa [8]<br>Skeggdregil [8] | Skeggrípa |
| Lore | | |
| Eye-ring | Eygnaringur [8] | Eygnaringur |
| Crown stripe | | Skallarípa |
| Supercilium | Brúnarrípa [8] | Brúnarrípa |
| Lateral crown-stripe | | Skallasíðurípa |
| Eye-stripe | Eygnarípa [8]<br>Eygnadregil [8]<br>Vørmur [8] | Eygnarípa |
| Pupil | Sjónopna [7] | Sjónopna |
| Iris | Lithinna [7,8] | Lithinna |
| Cere | | Saðil |
| Mantle | Bak [6,8]<br>Kápa [6] | Kápa |
| Back | Bak [6,8]<br>Kápa [6] | Bak |
| Thigh | | Lær |
| Tibia | Langleggur [1,3,4,5] | Langleggur |
| Tibio-tarsal joint | Fótliður [3,4,5,6]<br>Knæliður [1]<br>Knæ [8] | Fótliður |

| | | |
|---|---|---|
| Tarsus | Ristleggur [1,3,4,5,8]<br>Fótleggur [5,6,8] | Fótleggur |
| Inner toe | Inntá [1,3]<br>Framtá [4] | Innaratá |
| Middle toe | Miðtá [1,4,6] | Miðtá |
| Outer toe | Úttá [3,4,6] | Ytratá |
| Hind toe | Baktá [1,4,5,6] | Baktá |
| Pectinated claw | Klógv [1,5] | Klógv |
| Web | Fitja [1,3,5,6]<br>Fit [5] | Fitja |
| Carpal joint | Knúgvi [6] | Knúgvi |
| Sole | Il [7] | Il |
| Rump | Drunnur [1,2,6] | Drunnur |
| Vent | | Got |
| Flank | Síða [6]<br>Lið [8] | Síða |
| Belly | Búkur [6,8] | Búkur |
| Breast | Undir vongbrigðuni [6] | Bringa |
| Chest | Bringa [8] | Bringa |

Talva 2. Ensk heiti úr bókini Fundamentals of Ornithology (van Tyne og Berger, 1976), føroysk heiti úr fleiri keldum: [1]Graba, 1987; [2]Hansen, 1972, [3]2005; [4]Nørrevang, 1993; [5]Ryggi, 1978; [6]Skála og Mikkelsen, 2013 og okkara uppskot um hvat er frægasta orðið at brúka á føroyskum.

| Ensk heiti | Føroysk heiti | Okkara uppskot |
|---|---|---|
| Contour feathers | Fjaðrar [2,3,5]<br>Lívdarfjaðrar [1]<br>Verndarfjaðrar [3] | Fjaðrar |
| Down feathers | Dún [2,3,5]<br>Dúnfjaðrar [5] | Dún |
| Aftershaft | | Hjáfjøður |
| Vane | Fínafjøður [6] | Blað |
| Rachis | Stavur [4]<br>Leggur [2,3] | Leggur |
| Calamus | Posi [2,3] | Posi |
| Barb | Teinur [2,3] | Teinur |
| Barbule | Hjáteinur [2,3] | Hjáteinur |
| Hamuli | Krókur [2] | Krókur |

## Tøkk

Jens-Kjeld Jensen og Marjun Arge Simonsen, fyri ein munandi part av tí arbeiði, ið er lagdt í hesa grein. Dorete Bloch, fyri gjøgnumlestur og góðar viðmerkingar til greinina. Føroya Náttúra – Føroya Skúli, fyri brúk av mynd (Mynd 5) úr bókini Dýralæra 3 (Hansen, 1972). Oxford University Press, fyri brúk av myndum (Mynd 1 – 4) úr bókini Handbook of the Birds of Europe, the Middle East, and North Africa: The Birds of the Western Palearctic. Vol. 1: Ostrich to Ducks (Cramp, 1977)

## Heimildir

Cramp, S. 1977. Handbook of the Birds of Europe, the Middle East, and North Africa: The Birds of the Western Palearctic. Vol. 1: Ostrich to Ducks. Oxford University Press.

Graba, C. J. 1987. Dagbók skrivað á eini ferð til Føroya í árinum 1828. Eyðun Winther týddi úr týskum. Tórshavn: Emil Thomsen.

Hansen, T. 1964. Dýralæra. Tórshavn: Føroya náttúra – Føroya skúli.

Hansen, T. 1972. Dýralæra 3. Tórshavn: Føroya náttúra – Føroya skúli.

Hansen, T. 2005. Náttúrusøga. Dýr og plantur. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur.

Nørrevang, A. 1993. Tí hóttir olja fuglastovnarnar. Frøði, 1(1).

Poulsen, J. H. W., Simonsen, M., Jacobsen, J. í L., Johansen, A. og Hansen, Z. S. 1998. Føroysk-føroysk orðabók. Orðabókagrunnurin. Uppslag 25. august, 2014, á www.sprotin.fo

Ryggi, M. á. 1978. Fuglabókin. Dýralæra 2 (2. útg.). Føroya Skúlabókagrunnur.

Skála, A. í og Mikkelsen, J. 2013. Ensk-føroysk orðabók. Sprotin. Uppslag 4. novembur, 2013, á www.sprotin.fo

Sørensen, S. og Bloch, D. 1990a. Fuglar í Norðurhøvum. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur.

Sørensen, S. og Bloch, D. 1990b. Fugle i Nordatlanten. G. E. C. Gad.

Van Tyne, J. og Berger, A. J. 1976. Fundamentals of Ornithology (2. útg.). New York: John Wiley & Sons.